# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*



# FLOTTUR SHO




**FESTIVALUR**

*Volvo lastbilurin Texas Ranger við flottari lakkering*

## Til Trucker Festivalin í Klaksvík var ein flottur showbilur komin úr Danmark

**Myndir: Hans A. Norðfoss**

Eins og í fjør varð ein sonevndur showbilur avdúkaður, tá festivalurin byrjaði. Hesaferð var tað ein Volvo lastbilur við krana hjá fyritøkuni Preben Nielsen í Ballerup. Tað er Henrik Kofod, sum dagliga koyrir bilin. Hann hevur staðið fyri projektinum við at gera bilin um til ein sonevndan showbil við sera flottari lakkering og dekorering í kabinuni. Bilurin vakti eisini ans á festivalinum.

**mg**



**FESTIVALUR**

*Leðurkabinan er hvít við flottari dekorering*




*Olaf Mortensen frá Pitstop við sínum Lada Niva*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Lada eykalutir úr Týsklandi

**Sølan av russisku Lada bilunum er hildin uppat her hjá okkum og í grannalondum okkara.**

**Olaf Mortensen frá Pitstop, sum seldi Lada í Føroyum, sigur, at tað koyra fleiri Lada bilar í Føroyum, sum ongan góðan hava, tá tað kemur til sølu og eykalutir.**

**Í hesum sambandi hevur hann eina adressu í Týsklandi, sum áhugað kunnu venda sær til, um tey hava brúk fyri eykalutum.**

**Eykalutasølan eitur: AET Handels GmbH. Tel: 0049(0)33432-73047. Fax: 0049(3)33432-73061. e-mail: aet-handels-gmbh@gmx.de.**

**Olaf sigur, at fólk mugu sjálvi bíleggja sínar egnu eykalutir. Hava tey tørv á at fáa nummarið á eykalutunum, eru tey vælkomin at seta seg í samband við Pitstop á Hjalla.**